GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING

# SØKIR EFTIR GRANSKARA

Granskingardepilin fyri Økismenning søkir eftir granskara – búskaparfrøðingi, samfelagsfrøðingi, ella líknandi – at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt verkætlanarsett starv, sum í fyrsta umfarið gongur fram til ársenda 2006.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um ymiskar granskingarverkætlanir. Meiri ítøkiligt fevnir arbeiði m.a. um at fyrireika verkætlanir, savnað inn tilfar, viðgera, greina og tulka tilfarið og leggja tað fram skrivliga og munnliga.

**Vit kunnu bjóða**
Granskingardepilin fyri Økismenning er eitt spennandi arbeiðspláss við skiftandi granskingar uppgávum, fevnandi um føroyskar verkætlanir eins væl og verkætlanir, sum verða gjørdar í samstarvi við útlendskar granskarar og granskingarstovnar. Granskingardepilin fyri Økismenning átekur sær eisini umbidnar verkætlanir fyri stovnar og feløg í Føroyum og uttanlands.

Við starvinum fylgja eisini møguleikar at taka lut í altjóða ráðstevnum og verkstovum út í heimi eins væl og í Føroyum.

Granskingardepilin fyri Økismenning hevur skrivstovur í Vági og í Klaksvík. Arbeiðsstaðurin er í hesum førinum í Vági, men eru tó góðir møguleikar fyri lagaligum skipanum hesum viðvíkjandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið universitetsútbúgving innan búskaparfrøði, samfelagsfrøði, ella líknandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunir – men ikki eitt krav – at ein hevur royndir sum granskari ella frá arbeiði í øðrum granskingarumhvørvum.

Vit vænta, at tú ert førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, umframt at samstarva við onnur starvsfólk í smb. við granskingarverkætlanir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 8. mars 2006. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (Curriculum Vitae), viðmælum og øðrum skulu sendast:

**Granskingardepilin**
**fyri Økismenning,**
**Postboks 18**
**900 Vágur**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Dennis Holm, á teldupostadressuni dennis@region.fo ella á tlf. 374477.

crea 458006

GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING
Postboks 18 · 900 Vágur · www.region.fo

---

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

# Fíggjarleiðari til P/F Hotel Hafnia

Fyri P/F Hotel Hafnia verður søkt eftir fíggjarleiðara.

Á hotellinum starvast 40 fólk.

**Starvið**
Starvið fevnir m.a. um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði,
- umsiting av lønartengdum viðurskiftum hjá starvsfólkum,
- gerð av fíggjarætlanum,
- gerð av mánaðar- og ársroknskapum, umframt
- at samskifta við stjórnina í fíggjarspurningum.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur:
- Hollan kunnleika til bókhald,
- kunnleika til bókhaldsskipanina Concorde og Lundan,
- kunnleika til E-tollskipanina
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og
- evni at samstarva.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 1. apríl 2006

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 22 28 52.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut.
revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM 85

---

# Starv sum stuðul 20 t/viku

- Eitt tíðaravmarkað starv sum stuðul hjá næmingi í 3. flokki, sum hevur serligan tørv, er leyst at søkja. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Starvið verður at seta sum skjótast ella í seinasta lagi 1. apríl.

**Starvið er tíðaravmarkað til 24. juni 2006.**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá Suna í Hjøllum, skúlastjóra á tlf. 444087 ella 214087.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 15. mars kl. 10.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúli**
**Postboks 9**
**FO-530 Fuglafjørður**

*Í Fuglafjarðar skúla ganga 350 næmingar í 19 flokkum. í 1.-7. fl. eru 11 flokkar, meðan í 8., 9., 10. fl. eru 8 flokkar. Í Fuglafjarðar skúla starvast 35 lærarar og 1 stuðul.*

---

Lesið Sosialin - so eru tit við

---

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Skála bygd

Næsti útskiftingarfundur verður mikudagin 15. mars 2006 kl. 10.00 í gamla skúla í Skálafirði.

Útskifting av matr. nr. 539, Skálafjall Miðjan, og matr. nr. 541a, Skálafjall Ytripartur, Skála bygd, verður endað.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útsk. form.

---

# Dr. Ingridar meinigheits-barnagarður

søkir eftir einum fólki, at arbeiða sum sjúkra- og feriuavloysari á stovninum so skjótt sum tilber. Persónur við royndum innanfyri starvsøkið, hevur fyrimun.

Tit kunnu senda eina skrivliga umsókn til

**Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð**
J. Paturssonargøta 13
FO-100 Tórshavn
Tlf. 312253/212253